22100099

International Baccalaureate
Baccalauréat International
Bachillerato Internacional

**FAROESE A1 – STANDARD LEVEL – PAPER 1**
**FÉROÏEN A1 – NIVEAU MOYEN – ÉPREUVE 1**
**FEROÉS A1 – NIVEL MEDIO – PRUEBA 1**

Thursday 13 May 2010 (afternoon)
Jeudi 13 mai 2010 (après-midi)
Jueves 13 de mayo de 2010 (tarde)

1 hour 30 minutes / 1 heure 30 minutes / 1 hora 30 minutos

INSTRUCTIONS TO CANDIDATES

- Do not open this examination paper until instructed to do so.
- Write a commentary on one passage only. It is not compulsory for you to respond directly to the guiding questions provided. However, you may use them if you wish.

INSTRUCTIONS DESTINÉES AUX CANDIDATS

- N'ouvrez pas cette épreuve avant d'y être autorisé(e).
- Rédigez un commentaire sur un seul des passages. Le commentaire ne doit pas nécessairement répondre aux questions d'orientation fournies. Vous pouvez toutefois les utiliser si vous le désirez.

INSTRUCCIONES PARA LOS ALUMNOS

- No abra esta prueba hasta que se lo autoricen.
- Escriba un comentario sobre un solo fragmento. No es obligatorio responder directamente a las preguntas que se ofrecen a modo de guía. Sin embargo, puede usarlas si lo desea.





© International Baccalaureate Organization 2010

*Skriva **aðra** av fylgjandi uppgávum:*

**1.**

**500 fj. vestan fyri Kap Verde oyggjarnar 1. des. 1996**

Eg liggi í koyggjuni og eri júst sovnað eftir vaktarskifti, tað var gott umsíðir at verða avloyst eftir hundavaktina[1]. Á vakt nú er Richard, hann er einans 18 ár, úr Hetlandi og yngsti maður umborð.

Eg droymi um ræstan fisk og spik, kenni hendan serstaka luktin av fiski og spiki í nasagluggunum, brádliga brotnar dreymaheimurin, eg hoyri eitt hart og snjalt buldur, har er einki at ivast í, okkurt splintraðist, næstan samstundis hoyri eg Richardsa ræðslusligna skríggj: „Durita, Durita".

Meðan eg loypi úr koyggjuni, og tey sekundini tað tekur at renna yvir til leytaran og í tveimum stevum vera uppi á dekkinum, fara alskyns ræðumyndir gjøgnum høvdið á mær: Eru vit niðursigld? Lekur báturin? Var tað masturin, ið brotnaði? Ella hava vit siglt á ein hval?

Øgiligur larmur er á dekkinum, tað buldrar og brakar, og náttin er bikasvørt. Enn síggi eg einki, men hoyri á larminum og á Richardsa ósamanhangandi brølum, at tað er klyvarin[2], tað er klyvarin, ið slær og bangar í tí nógva vindinum, men hví?

Tann fremra lúkan fer upp, eyguni byrja at venja seg við myrkrið, høvdið á Mikkjali kemur upp um lúkukarmin, samstundis síggi eg, hvat er hent: Tann 6½ metur langi og 40 kilo tungi spílibummurin, sum heldur klyvaranum útspílaðum, tá vindurin er undan, er brotnaður og hongur nú og dinglar í tveimum pettum, tað eina fast í stórmastrini, hitt hongur í klyvaraskeytinum og slær í allar ættir.

Alt gongur skjótt fyri seg, brádliga er øll manningin á dekkinum, øll í berum undirklæðum í øllum vindinum og sjórokinum. Nú ræður um at fáa klyvaran niður, uttan at gera sær sjálvum mein av tí langa, tunga spílibumminum, sum slær og brestist í vindinum og rullinum.

Mikkjal og eg fara fram á fordekkið, náa akkurát at bukka okkum, tá ið báturin kastar seg á liðina í einum aldudali, og spílibummurin kemur syftandi beint ímóti okkum. Mikkjal fær loyst fallið, klyvarin kemur dettandi niður, meðan Martin og Oddvør hála, alt tey eru ment, í skeytið, sum rykkir og skrykkir. Jakob er farin at stýra, Mikkjal og Richard fáa tamarhald á tí lívsfarliga spílibumminum, fáa hann niður á dekkið og halda, meðan eg bindi klyvaran úti á tí dansandi sprytinum[3].

Durita Holm, *Ferðin um bláu gongustjørnuna* (1999)

---

[1] hundavakt: vaktin frá midnátt til kl. 4 á morgni
[2] klyvari: tríhyrnt segl fremst á seglbáti
[3] spryt: stong fram úr gronini á skipi til at spenna út klyvara við

– Hvussu lýsir frásøgufólkið støðuna umborð?

– Viðger málið í brotinum.

– Á hvønn hátt vekir teksturin hugsanir og kenslur til evnið, ið umrøtt verður?

**2.**

**Frælsi**

Tað stendur í bløðunum,
skúlastovurnar rópa tað,
tingið tanlar tað,
á hvørjum møti verður tað jaglað,
og tað flaggar í sólini,
meðan røðarapallar sleikja sær um munnin
og senda tað út yvir nýgreiddar skrúðgongur:
akta,
ver lýðin,
skikka tær væl,
ver góður,
legg hendurnar saman
og arbeið,
so verður tú frælsur,
so verður tú frælstur.

Og úr útvarpinum lekur tað dagliga
niður yvir morgundrekka,
niður yvir brendar tenn,
niður yvir ungt sakloysi
og gamlar timburmenn,
grannskoðarin nikkar,
meðan hann leggur næstu íløguna til rættis,
partaeigarin slotar murrandi,
meðan hann skrivar kekk út
til heimsins neyðstøddu,
doktarin skrúvar harðari frá,
áðrenn hann fer í skápið eftir loynifløskuni;
úti í móttøkuni
verður omman skrivað upp á bíðilistan.
Hon dugir sálmin tey syngja
aftan á lestur.

Gunnar Hoydal, *Hús úr ljóði* (1987)

– Hvussu verður temað í yrkingini borið fram?

– Viðger málið og skaldsligu amboðini í yrkingini.

– Á hvønn hátt ávirkar skrivingarlagið fatanina av yrkingini?